## UTTAN ÚR HEIMI

## Tað verður ja

Ein kanning vísir, at 70 prosent av teimum norsku veljarunum vænta, at meiriluti verður fyri norskum limaskapi í ES, tá fólkaatkvøða aftur verður um spurningin. Bara 20 prosent vænta, at svarið verður eisini nei næstu ferð.

Kanningin vísir eisini, veljararnir hjá teimum flokkunum, sum eru ímóti ES-limaskapi, vænta meiriluta fyri limaskapi. Kristiligi Fólkaflokkurin hjá Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra og Sosialistiski Vinstriflokkurin eru ímóti limaskapi í ES, men eftir kanningini vænta flestu veljararnir hjá báðum flokkunum, at svarið næstu ferð verður ja.

Formaðurin í rørsluni Nei til ES, Sigbjørn Gjelsvik, kennir seg kortini ikki ótryggan. Við Aftenposten sigur hann, at seinast vístu summar kanningar eisini meiriluta fyri limaskapi, men tá avtornaði, var meirilutin ímóti at fara upp í ES. Sigbjørn Gjelsvik sigur, at nógv fara at broyta áskoðan, tá tey fáa at vita, hvørjar avleiðingar limaskapurin fær fyri eitt nú landbúnaðin og fiskivinnuna.

## Onga ætlan um viðurkenning

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, segði í einari sjónvarpssamrøðu sunnudagin, at pakistanska stjórnin umhugsar at viðurkenna ísraelska ríkið, og at stjórnin fer at umrøða spurningin um at knýta diplomatiskt samband við Ísrael.

Hetta hevði verið ein kúvending í pakistanskum uttanríkispolitikki, og tí kom tað ikki heilt óvart á, tá landsins verjumálaráðharri, Rao Sikandar Iqbal, longu í gjár avsannaði tað, sum forsetin hevði sagt.

Verjumálaráðharrin sigur við tíðindastovuna PNS, at stjórnin hevur ongar ætlanir um at viðurkenna Ísrael, og at spurningurin hevur heldur ikki verið umrøddur í stjórnini. So Ísrael verður ikki viðurkent í bræði, legði ráðharrin afturat.

## Betri prís fyri seyðakjøt

Grønlendskir bøndur, sum hava seyð, eru ikki nøgdir við tann prísin, sum teir fáa fyri kjøtið.

Nógvir bøndur í Grønlandi eru illa fyri fíggjarliga, og í síðstu viku kravdu teir at fáa betri prís fyri seyðakjøtið. Sum er fáa teir 31 krónur fyri kilo, men teir krevja at fáa 40 krónur. Men tað fáa teir ikki. Bøndurnir hava ein fimm ára sáttmála við sláturvirkið Nuka. Eftir honum fáa teir 31 krónur fyri seyðakjøtið, og enn eru trý ár eftir av sáttmálanum.

Sláturvirkið vísir samstundis á, at tað fær ikki nóg mikið av seyði frá bóndrunum. Virkið skal hava minst 25.000 krov um árið, men í fjør fór talið niður um 20.000, og leiðslan sigur, at so leingi bøndurnir ikki klára at lata meiri, kunnu teir heldur ikki vænta at fáa betri prís.

## Oyðileggja frumskógin

Umhvørvisverndarfelagsskapir ávara nú um, at vit oyðileggja alt ov nógvan frumskóg.

Kanningar í Suðuramerika vísa, at bara í 2002 vórðu 25.000 ferkilometrar av frumskógi í Amazonasøkinum gjørdir til landbúnaðarøki, og tað var væl meiri enn árini frammanundan. Umhvørvisverndarfelagsskapirnir vísa á, at sambært avtalu við brasilsku myndugleikarnar skal frumskógurin varðveitast, men við hesari gongdini gongur tað skjótt tann skeiva vegin, sigur felagsskapurin Friends of the Earth in Brazil.

Brasilski forsetin, Lula, hevur boðað frá, at hann er líðugur við eitt uppskot, sum skal forða fyri, at ov nógvur frumskógur verður feldur. Men umhvørvisverndarfólk siga, at uppgávan hjá forsetanum verður trupul, tí fyrr hava slíkar lógir ikki víst seg at hava størvegis ávirkan. Ferð eftir ferð hevur tað víst seg, at fólk, sum verða tikin fyri at hava brotið slíkar lógir, sleppa undan revsing, og tað eggjar øðrum til at halda fram.

# Ísrael í øðini inn á BBC

**Ísraelska stjórnin vil ikki samstarva við bretska BBC longur, eftir at BBC um vikuskiftið endursendi eina sending, sum avdúkar evnini hjá Ísrael at gera hópoyðingarvápn.**

ÍSRAEL

*Árni Joensen*

Sendingin varð fyrru ferð send fyri trimum mánaðum síðani hóast hvøss mótmæli úr Ísrael. Leygardagin varð sendingin endursend, og hesaferð kom svarið alt fyri eitt úr Tel Aviv: Ísrael vil einki hava við BBC at gera longur.

Avgerðin ber í sær, at hvørki tíðindafólk ella framleiðarar hjá BBC sleppa at hava nakað samstarv við ísraelsku myndugleikarnar, og ísraelskir embætismenn fara ikki at tosa við tíðindafólk hjá BBC. Sambært blaðnum Haaretz merkir avgerðin eisini, at tað kann gerast trupult hjá BBC-tíðindafólkum at fáa innferðar- og arbeiðsloyvi í Ísrael.

Tað, sum hevur fingið øði í ísraelsku stjórnina, eru myndir í sendingini, sum vísa sjálvt hjartað í ísraelsku kjarnorkuvápnaverkætlanini, verkið Dimona í Negev-oyðimørkini. Harafturat vísti BBC myndir av einum stovni sunnan fyri Tel Aviv, sum fæst við lívfrøðiliga gransking. Franskir fjølmiðlar hava fyrr avdúkað, at stovnurin hevur gjørt ikki færri enn 43 ymisk lívfrøðilig og onnur vápn.

Leiðarin á tíðindatænastuni hjá ísraelsku stjórnini, Danny Seaman, hevur fyrr sagt, at framferðin hjá BBC er mest átøk antisemitismu, og sunnudagin segði hann, at einasta endamálið hjá BBC var at spilla Ísrael út.

Tað hevur leingi verið alment kent, at Ísrael hevur hópoyðingarvápn, sjálvt um landið ongantíð hevur viljað viðgingið, at so er. Ísrael hevur ikki skrivað undir altjóða sáttmálan, sum bannar londum at gera ella at goyma evnafrøðilig og lívfrøðilig vápn, og landið hevur heldur ikki staðfest sáttmálan ímóti at breiða út kjarnorkuvápn.

# Katharine Hepburn deyð



*Katharine Hepburn*

**Katharine Hepburn var ein av teimum gomlu Hollywood-stjørnunum. Sunnudagin doyði hon, 96 ára gomul.**

FILMSLIST

*Árni Joensen*

-Við sínum einastandandi evnum gleddi Katharine Hepburn áskoðararnar í meiri enn seksti ár. Hon var ein vitug og fjølbroytt kvinna, og vit fara at minnast hana sum nakað serstakt í okkara listarheimi, stóð í einari kunngerð frá Hvítu Húsunum í Washington, tá deyðboðini av gomlu filmskvinnuni vóru komin.

Katharine Hepburn vann sín fyrsta Oscar sum besti kvinnuligi leikarin í filminum "Morning Glory" longu í 1933. Triggjar ferðir afturat fekk hon ta fremstu virðislønina í filmsheiminum, í 1967 fyri sín leiklut í filminum "Guess Who's Coming to Dinner", í 1968 fyri filmin "The Lion in Winter", og sín seinasta Oscar fekk hon í 1981 fyri leiklutin í filminum "On Golden Pond".

Í sínari longu tíð í filmsheiminum spældi hon saman við nøkrum av teimum best kendu stjørnunum so sum James Stewart, Humphrey Bogart, Spencer Tracy, Gary Grant, John Wayne og Henry Fonda.

Katharine Hepburn giftist í 1920-unum, men seks ár seinni sleit hon hjúnarbandið. Hon átti eingi børn.




